## Rósur frá miðlunum

Hóast tær hingu nakað við høvdinum eftir taptu finaluna, so var tó skjótt hjá føroysku spælarunum at finna smílini framaftur. Ikki minst mundi tað gera góðan mun, tá føroysku fjølmiðlaumboðini eftir dystum komu við reyðum rósum til allar spælararnar. Hóast teir teir leitaðu um tað mesta av Sarajevo, funnu teir útsendu blaðmenninir akkurát 16 rósur - og ikki eina meira. Men bæði venjararnir og fysioterapeuturin fingu tó eisini sítt. Tina S. Jacobsen fekk eina fitta bamsu, meðan Flemming Raben og Svein Rógvi Nielsen fingu eina bambus-samanplanting í part.

**-mørk**



## Anna Maria átti sunnudagin

Við at steingja sína høgru síðu, samstundis sum hon eftir steðgin skoraði ferð eftir ferð, vann Anna Maria Samuelsen heiðurin sum besti føroyski spælarin í finalu-dystinum móti Bosnia. Fyri hetta fekk hon sjálvsagt enn eina útgávu av Adida-taskuni, sum hesa ferð varð handað av Emil L. Jacobsen.

**-mørk**

Føroyar-Georgia 40-20 (19-13):

# Skaðafrí armlás

**Føroyar vunnu bólk B í stórum stíli, tá tær bukaðu Georgia. Men móti dystarenda gjørdist talan um spentar støður, tá dómararnir als ikki tóktust kenna til reyða kortið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Vogosco, Bosnia:** Vóru okkara kvinnur klárt sterkasta liðið í bólkinum, so var Georgia líka so klárt tað næststerkasta.

Fyrst og fremst, so dugdu hesar at spæla hondbólt, og tað kundi tíverri ikki sigast um Ongland og Albania.



*Georgisku spælararnir spældu sera hart uttan at griksku dómararnir revsaðu teimum, sum teir áttu at havt gjørt*

*Mynd: Alexandar Djorovic*

### Einki time-out

Fyrstu løtuna av dystinum megnaðu teir eisini at geva okkara liðið eitt lítið sindur av trupulleikum. Serstakliga hevði Una Olsen trupult at halda stóru Tsitskishvili á strikuni, og tí varð bólturin ofta lyftur upp á strikuna.

Samstundis, so gjørdi mótstøðan alt tað, sum tær vóru mentar, at forða føroyskum kontraálopum. Roynt var at fáa veruligar avstlutningar móti málinum, og varð dømt fyri álopsfeili, so royndu tær í fleiri førum at halda bóltinum, til spælarar vóru komnar heim at verja.

Tí máttu onnur vápn eisini nýtast hjá okkara liði, og serstakliga Simona Hansen gjørdi her um seg. Tiltikna sleggjan varð fleiri ferðir sveiggjað við harðari megi, og eisini í verjupartinum hevði hon kropsligu styrkina, sum kundi halda tungu mótstøðuni.

Og spakuliga fór luftin úr mótstøðuni. Sjálvar høvdu tær nýtt sítt time-out, og so gjørdi føroyski bonkurin bara skjótt av, við als ikki at nýta sítt. Hetta so mótstøðan onga hvíld skuldi fáa.

Tá Fríða Petersen so fullkomuliga læsti málið fyrsta partin av seinna hálvleiki, skrædnaði av álvara. Fimm kontra-mál á rað skaptu luftina, sum skuldi til, soleiðis at Georgia misti alla vón, og so snúi tað seg enn einaferð um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

### Reyðu kortini

Meira enn at vinna stórt, so snúi tað seg nú eisini um, at sloppið varð undan býttum skaðum. Og her vístu dómararnir seg als ikki at vera sína uppgávu vaksnar. Sterka strikan hjá Georgia var farin av vøllinum við skaða, og møguliga ilskaðust tær um hetta – eisini hóast hetta hendi í tilvildarligari støðu. Ella var møðin bara farin at kosta í konsentratiónini.

Undir øllum umstøðum, so vóru vit seinastu tíggju minuttirnar vitni til tríggjar tilburðir, sum uttan nakað sum helst roks áttu at kosta reytt kort. Heidi Maria, Ása og Joan vórðu allar tríggjar skræddar í skotarmin í gjøgnumbroti, og hvørja ferð komu bara tveir fingrar frá grikska dómaraparinum.

Lukkutíð, so gjørdist talan ikki um skaðar, og tí kundi føroyski bonkurin anda nakað lættari, tá seinasta bríkslið hevði ljóðað. Við samlaða málmuninum, 175-29! hevði føroyska liðið vunnið bólkin, og so var bara at gera klárt til hálvfinalu.

## FAKTA

**Føroyar-Georgia 40-20 (19-13)**

**Málskjúttar**
**Føroyar:** Simona Hansen 8(1), Annika K. Ljósstein 6(2), Unn Kragesteen 5, Anja Heinadóttir 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Anna Maria Samuelsen 3, Ása Dam á Neystabø 3, Heidi Maria Akselsen 3, Durita Ljósstein 2, Fríða Marjunardóttir 2, Annika Thomsen 1
**Georgia:** Eloshvili 5(1), Tsitskishvili 5, Baiandurian 4(2), Shonia 3(2), Jurulishvili 2, Margiani 1
**Brotskøst:** Føroyar 3/4, Georgia 5/9
**Útvísingar:** Føroyar 3, Georgia 5
Dómarapar úr Grikkalandi

## Málmenninir eru sum eitt lið

**Hóast ein teirra altíð má sáldast frá, so leggja føroysku málverjarnir alstóran dent á samanhaldið, sum er teirra millum. Og hóast vónbrot kunnu fylgja við, so nertir hetta ikki sterka samanhaldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru Fríða Petersen (Neistin), Erla Zachariassen (Neistin) og Tomma Petersen (VÍF), sum ber gulu føroysku málverjabúnarnir í Challenge Trophy-kappingini í Bosnia.

Talan hevur alla ferðina verið um knallharða kapping millum tær tríggjar. Ein kapping, sum sjálvandi er sunn fyri liðið, men vandin fyri vónbrotum er eisini stórur, tá venjararnir støðugt noyðast at velja eina av teimum frá, hóast eingin teirra á nakran hátt hevur spælt seg av liðnum.

Í hálvfinaluni móti Cypros leygardagin var tað Tomma Petersen úr VÍF, sum vardi málið størsta partin av dystinum, og tað er ein støða, sum hon ikki hevur kent so nógv til her á ferðini. Men hóast avmarkaða spælitíð, so legði Tomma sjálv stóran dent á, at tær tríggjar bara síggja við positivum eygum upp á kappingina um plássið.

– Sjálv havi eg havt ein lítlan skaða at dragast við, og tað hevur verið fremsta orsøkin til, at eg havi spælt somikið lítið higartil. Eg visti eisini av, at eg fór at fáa møguleikan í dag (leygardagin, blðm.), og so mást tú bara taka av hesum møguleika. Og so leggi eg heldur ikki so nógv í, at eg sat yvir onkran dyst í bólkaspælinum, tí teir høvdu vit vunnið, áðrenn vit fóru á vøllin. So á tann hátt var talan um nógv betri avbjóðing.

### Stuða málverjanum

Men kann tað ikki skapa spenningar, tá venjararnir støðugt mugu velja eina av tykkum frá, hóast hendan avgjørt hevur prógvað sítt virði fyri liðið?

– Jú, avgjørt. Men soleiðis hevur tað verið alla tíðina. Eisini í Italia, har eg bara var við í einum av fimm dystum. Tað var einki serliga stuttligt, men soleiðis er tað bara, og soleiðis er tað fyri allar á liðnum.

Og ger tað ikki eisini, at tit eru meira tendraðar, hvørja ferð tit fáa møguleikan at byrja inni?

– Sjálvandi, men tað kann eisini virka øvugt. Tí vandi kann vera fyri, at tankarnir vera meira fokuseraðir um mistøk, sum verða gjørd, heldur um positvu lutirnar í spælinum. Og tá kann ganga galið, sigur Tomma, áðrenn hon leggur afturat, at tær allar royna at stuðla tí, sum stendur í málinum. Eisini hóast hetta kann merkja pláss á beinkinum í næsta dystinum.

– Kappingin okkara millum er bara positiv. Vit tríggjar hava eisini kamar saman her á hotellinum, og bæði millum og undir dystunum tosa vit saman og royna at stuðla hvørjari aðrari. Bæði við at repetera skotstyrkina hjá mótstøðuni, eins og vit í dystunum vegleiða um, hvat roknast kann við.

– Og soleiðis bæði eigur og má tað vera. Vit eru her saman sum eitt lið, og tí mugu vit allar standa saman, um best møguliga úrslitið skal røkkast. Eisini hóast tað so kostar ein túr á beinkin av og á, ljóða avgjørdu boðini frá Tommu.



*Tomma Petersen spældi sera væl í føroyska málinum*

*Mynd: Alexander Djorovic*